# Barnavanlukkutrygd loftar, tá ið illa vil til

**Hvat er nú hent!** Soleiðis hava nógv hugsað, tá ið lítla barnið grætur, sum um at seinsta stundin var komin. Tíbetur er skaðin sum oftast ikki so álvarsamur, sum gráturin boðar frá. Tíverri hendir tað tó eisini, at børn eru fyri einum óhappi, sum merkir teirra tilveru.

## Hvønn fevnir Barnavanlukkutrygd um?

Barnavanlukkutrygd er til børn upp til 18 ár.

## Nær og hvar er barnið tryggjað?

Barnavanlukkutrygd er galdandi alt samdøgrið og dekkar allastaðni, m.a. á dagstovni, í skúla, í frítíðini og í sambandi við frítíðarítriv.

## Hvat fevnir Barnavanlukkutrygd um?

Barnavanlukkutrygd fevnir bæði um smærri óhapp, so sum tannskaðar, og størri skaðar, har barnið fær varandi mein. T.d. kann Barnavanlukkutrygd veita fíggjarligt endurgjald, um barnið er komið til skaða í trampolinuni og hevur tørv á at fáa viðgerð hjá fysioterapeuti.

Í summum førum er barnið dubulttryggjað. Kommunan, ítrottarfelagið ella onnur kunnu hava valt at tekna eina bólkavanlukkutrygging fyri t.d. barnagarðin ella ítróttarfólkið. Tað merkir, at um barnið kemur til skaða, meðan tað er umfatað av eini bólkavanlukkutrygging, umframt síni egnu persónligu vanlukkutrygging, kann barnið fáa endurgjald frá tveimum tryggingum.

Tað er altíð eitt gott hugskot at kanna eftir, hvat fyri tryggingum títt barn er fevnt av.

## Soleiðis dekkar Barnavanlukkutrygd

| **Barnavanlukkutrygd** | | |
|---|---|---|
| Avlamni á 5% ella meir | ✓ | |
| Jarðarferðarhjálp | ✓ | |
| Viðgerðar útreiðslur so sum fysioterapi ella kiropraktor | ✓ | |
| Flutningsútreiðslur | ✓ | |
| Tannskaði | ✓ | |
| Brilluskaði | ✓ | |
| Sálarlig kreppuhjálp | ✓ | |
| Hjálpitól | ✓ | |
| Plastiskar skurðviðgerðir | ✓ | |
| **Vanlukka** | **Procent** | |
| At missa bæði eyguni ella sjónina á báðum eygum | 100% | |
| At missa sjónina á øðrum eyganum | 20% | |
| Fullkomiliga missa hoyrnina á báðum oyrunum | 75% | |
| Fullkomiliga missa hoyrnina á øðrum oyranum | 10% | |
| At missa annað beinið | 65% | |
| At missa fótin | 30% | |
| At missa allar tærnar á øðrum fótinum | 10% | |
| | **Høgra** | **Vinstra** |
| At missa armin í akslarliði | 70% | 65% |
| At missa hondina | 60% | 55% |
| At missa tummilin | 25% | 20% |
| At missa ytsta kong á tumli | 12% | 12% |
| At missa fremsta fingur | 10% | 10% |

**Á lámi verður vinstra mett sum høgra og høgra sum vinstra.**

SENDISTOVAN



# Nær veitir Barna-vanlukkutrygd endurgjald?

Barnavanlukkutrygd veitir endurgjald, um avlamni eftir ein vanlukkutilburð er 5% ella meira. Um barnið doyr av einum vanlukkutilburði, so veitir hendan tryggingin jarðarferðarhjálp upp til 25.000 kr.

Ein vanlukkutilburður er "ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða", og er hetta ein treyt fyri endurgjaldi.

Tryggingin kann eisini veita endurgjald fyri minni álvarsligar skaðar, so sum skaðar á tenn, brillur ella fyri viðgerð hjá fysioterapeuti í sambandi við ein vanlukkutilburð.

# Nøkur dømi um hvat tryggingin kann veita endurgjald fyri

Um barnið hevur verið fyri einum vanlukkutilburði, sum lýst omanfyri, eru her nøkur dømi um, hvat endurgjald kann verða veitt fyri:

- Varandi avlamni á 5% ella meira
- Jarðarferðarhjálp upp til 25.000 kr.
- Viðgerðarútreiðslur hjá fysioterapeuti ella kiro-praktori, umframt flutningsútreiðslur í hesum sambandi
- Endurgjald fyri tannskaðar
- Endurgjald fyri brillur og kontaktlinsur. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at brillurnar eru á, ella kontaktlinsurnar eru í eygunum, tá vanlukku-tilburðurin hendir
- Keyp av brillum, kontaktlinsum og hoyritóli, um hetta er neyðugt eftir ein vanlukkutilburð, og barnið ikki brúkti hesi áðrenn tilburðin, ella um sjón/hoyrn er versnað eftir vanlukkutilburðin.
- Sálarliga kreppuhjálp
- Plastiskar skurðviðgerðir

Vanliga umfata vanlukkutryggingar ikki sjúku, men barnavanlukkutryggingin hjá Trygd fevnir eisini um beinleiðis fylgjur av meningitis ella fullkomna miss av sjón ella hoyrn í sambandi við sjúku.

# Ískoytisendurgjald

Førir ein vanlukkutilburður til eitt avlamnisstig á 30% ella meira, verður veitt eitt ískoytisendurgjald sum er 25% av vanliga endurgjaldinum - tó í mesta lagi 100.000 kr.

# Hvørjar skaðar fevnir tryggingin ikki um?

Her eru nøkur dømi um, hvat endurgjald ikki kann verða veitt fyri:

- Fylgjur av avlamni, ið vóru áðrenn vanlukkutilburðin
- Fylgjur av læknaligari viðgerð, sum ikki var í sambandi við vanlukkutilburð
- Tyggiskaðar á tenn

# Hvussu tekni eg Barnavanlukkutrygd?

Fyri at tekna eina barnavanlukkutrygging hava vit tørv á at vita navn, føðidato og p-tal hjá barninum.

Tú kanst eisini útfylla umsóknarblaðið til Barna-vanlukkutrygd, ið liggur á heimasíðu okkara, www.trygd.fo, undir teiginum "Skjøl".

Øll børn undir 18 ár eru á einari trygging, og gjaldið er tað sama, hóast tú hevur fleiri børn tryggjað.

# Gjald eftir egnum ynski

Tryggingargjaldið kann gjaldast eina ferð, tvær ferðir (+2%) ella fýra ferðir (+4%) um árið. Tú kanst gjalda umvegis Gjaldsskipanina – tá verður tryggingargjaldið altíð goldið stundisliga. Vilt tú heldur flyta peningin sjálv/ur, ber eisini til at gjalda við gjaldskorti ella gjøgnum netbanka hjá peningastovnunum.

# Tosa við okkum

Ynskir tú at tekna Barnavanlukkutrygd ella fáa meira at vita, ert tú altíð vælkomin at vitja okkum á Oknarvegi 5 í Tórshavn ella at støkka inn á gólvið í eini av deildunum hjá BankNordik ella Norðoya Sparikassa. Tú kanst eisini skriva til okkum á trygd@trygd.fo ella ringja á tel. 358 100. Ynskir tú at tekna Barna-vanlukkutrygd, men hevur trygging í øðrum felag, avgreiða vit øll viðurskifti í sambandi við skiftið fyri teg.

Hetta er ikki ein fullfíggjað lýsing av Barna-vanlukkutrygd. Sí nærri greining um endurgjald í tryggingartreytunum fyri Barnavanlukkutrygd, sum liggja á heimasíðu okkara, www.trygd.fo. Vit vegleiða og svara fegin spurningum um røttu tryggingina fyri teg og tíni.




**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

**Oknarvegur 5**
**P.O. Box 44**
**FO-110 Tórshavn**
**Faroe Islands**

**Tel +298 358 100**
**Fax +298 317 211**
**trygd@trygd.fo**
**www.trygd.fo**


**Trygd hugsar um teg**